Forkvinnan í Javnstøðunevndini:

# Altjóða Kvinnudagurin stóran týdning



- Skerjan av menniskjaliga frælsinum sæst longu hjá lítlum børnum, har smágentur t.d. fáa at vita, at tær ikki skulu tosa ov nógv og ikki vera so villar. Vit skuldu heldur roynt at lært tær at ført seg fram, og ístaðin fyri »Ver friðarlig!«, skuldu vit heldur sagt :»Før teg fram«, »Verð løgmaður« og líknandi, heldur Annika Wardum Joensen

**- Kvinnan stendur í flestu førum við høvuðsábyrgdini av børnum og húsarhaldi, og hetta gongur útyvir hennara møguleikar at vinna sær inntøku og taka lut í samfelagsarbeiðið, so sum at fáast við politikk og átaka sær nevndarsessir. Soleiðis sigur Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, sum eisini undrast á, at samfelagið ikki væntar sær meira av pápunum, tá um umsorgan ræður**

ALTJÓÐA KVINNUDAGUR

*Ragnhild Ellingsgaard*

Altjóða Kvinnudagurin varð av fyrstani tíð stovnaður í Keypmannahavn í 1910. Tað var týski feministurin og sosialisturin Clara Zetkin, sum kom við hugskotinum, og síðani tá hevur dagurin verði hildin um nærum allan heimin.

Eisini her heima merkjast rembingar av hesum tiltakið, men enn tykist ikki, sum vanligi føroyingurin leggur so nógv í hendan dagin.

Onkur hevur eisini havt hug at seta spurning við, um føroyskar kvinnur veruliga hava tørv á slíkum. Tær hava tað gott, sum er, og føroyingar eru jú eitt lagaligt fólkaslag.

Men forkvinnan í Javnstøðunevndini, Annika Wardum Joensen, er ikki samd í hesum.

- Tað er av alstórum týdningi, at vit geva okkum tíð til at tosa um viðurskifti hjá kvinnum, sigur hon.

Hon vísir millum annað á harðskap ímóti kvinnum og arbeiðs- og lønarviðurskifti hjá kvinnum sum økir, har vit eiga at seta inn og arbeiða fyri betranum. Annika nevnir t.d. inntøkumunin millum mannfólk og konufólk, sum enn er ov stórur í Føroyum.

- Hetta eiga vit ikki at góðtaka, og neyðugt er, at vit tosa um hesi viðurskifti, sigur forkvinnan í Javnstøðunevndini.

## Tey trý frælsini

Javnstøðunevndin fekk fyrispurning um at skipa fyri einum tiltaki á Altjóða Kvinnudegnum, men valdu tey at takka nei til hetta tilboð.

- Tann vanligi føroyingurin hevur ofta lyndi til at halda, at Javnstøðunevndin einans arbeiðir fyri kvinnum, og tí hildu vit ikki, at tíðin var búgvin til at fara undir slík tiltøk. Javnstøðunevndin arbeiðir fyri javnstøðu hjá báðum kynunum, greiðir Annika frá.

Hon ivast tó ikki í týdninginum av Altjóða Kvinnudegnum, har dentur verður lagdur á at betra um viðurskifti, sum viðkoma kvinnum um allan heim.

- Eg havi serliga bitið merki í trý evni, sum viðkoma kvinnum í Føroyum í dag. Hesi eru fíggjarligt frælsi, arbeiðsligt frælsi og menniskjaligt frælsi, greiðir Annika frá.

Um fíggjarligt frælsi sigur Annika, at ein ikki kann sigast at vera heilt frælsur, tá ein fíggjarliga er bundin av einum øðrum. Tað er ymiskt, hvussu kvinnur og menn uppliva hetta, sigur hon og vísir frá svenskum kanningum, har niðurstøðan var, at ein maður kennir seg fíggjarligan frælsan, tá hann ikki er bundin av eini mánaðarligari inntøku, meðan ein kvinna kennir seg fíggjarliga frælsa, tá hon ikki er fíggjarliga bundin av einum manni.

- Í Føroyum eru tað nógvar kvinnur, sum vinna millum 5.000 og 13.000 krónur um mánaðin, og er hetta ov lítið til at klára seg fyri. Føroyskir menn hava í miðal nógv hægri inntøkur enn føroyskar kvinnur, og hóast útreiðslustøðið í dag er so høgt, at fá kunnu sigast at vera fræls, hava menn tó nógv betri møguleikar fyri at kenna seg frælsan, sigur forkvinnan í Javnstøðunevndini.

Undir arbeiðsligum frælsi vil Annika leggja dent á, at einhvør eigur at hava møguleika fyri at útbúgva seg og arbeiða, har evnini og hugurin liggja.

- Tað skal ikki vera kynið, sum avgerð, hvar tú velur at arbeiða. Ei heldur fíggjarlig viðurskifti. T.d. haldi eg, at vit gera ov lítið fyri tær ungu mammurnar, sum - tá tær fáa barn - gevast í skúlanum og gerast bundnar at forsorgarhjálp. Um tær seinni ætla sær at fáa eina útbúgving, hava fáar ráð, tí tær tá noyðast at klára seg við lestrarstuðli. Hetta er at gera mismun á møguleikunum hjá kvinnum og monnum at nema sær útbúgving, greiðir Annika frá.

Víðari sigur hon, at kvinnan ofta hevur lyndi til at seta húsarhald og børn framum arbeiðið, millum annað tí at samfelagið væntar hetta av henni. Hervið koma vit eisini inn á ta menniskjaliga frælsið, har allar kvinnur skulu hava møguleika at fylgja teirra egnum ynskjum - og ikki lata seg stýra av umhvørvinum og væntanum hjá øðrum. Tað sama skal so sjálvandi eisini vera galdandi fyri menn.

- Skerjan av menniskjaliga frælsinum sæst longu hjá lítlum børnum, har smágentur t.d. fáa at vita, at tær ikki skulu tosa ov nógv og ikki vera so villar. Vit skuldu heldur roynt at lært tær at ført seg fram, og ístaðin fyri »Ver friðarlig!«, skuldu vit heldur sagt :»Før teg fram«, »Verð løgmaður« og líknandi. Vit skulu læra børn okkara at lurta eftir sær sjálvum og finna fram til, hvat tey innast inni vilja. Og læra tey at hugsa minni um, hvat 'hini' halda, heldur Annika Wardum Joensen.

## Børn ella arbeiði - bæði

Annika Wardum Joensen varð sett sum forkvinna í Javnstøðunevndini tann 6. desember seinasta ár. Áhugin fyri javnstøðuarbeiði kom, tá hon sjálv fekk børn.

- Áðrenn eg fekk børn, hevði eg ongantíð merkt til nakran serligan mun millum konufólk og mannfólk. Ikki uttan, at onkur arbeiðsgevari í eini setanarsamrøðu heilt álvarsamur spurdi, nær eg hevði ætlanir um at fáa børn, greiðir Annika frá.

Men tá børnini so komu, fekk Annika av álvara at merkja, hvussu torført tað kann vera hjá kvinnum at fáa arbeiðið, familju og heim at ganga saman í eina hægri eind.

- Eg kendi tað, sum at eg sjálv skuldi fáa alt at ganga upp, og dugdi illa at biðja um hjálp. Hetta er júst trupulleikin við væntanunum, sum liggja í luftini og ikki verða sagdar hart. Vit gita, men kunnu als ikki vita, hvat hini hugsa. Og eg kann ikki briksla nakran fyri, at eg ikki visti, hvat eg vildi ella skuldi. Júst hetta - »hvat vilt tú?« - haldi eg vera so týdningarmikið at tosa um.

Eitt dømi um, hvat samfelagið væntar í dag, er at mamman arbeiðir á niðursettari tíð, tá eitt par ikki megnar at fáa gerandisdagin við arbeiði og børnum at hanga saman. Men tá noyðist pápin ofta at arbeiða enn meir, tí við bara eini inntøku kann verða torført at fáa endarnar at røkka saman.

- Tá fáa vit tað klassiska býtið millum kvinnu og mann, sum eg meti er ótíðarhóskandi, har kvinnan framvegis hevur høvuðsábyrgd av húsi og børnum, og maðurin forvinnur pening. Eg haldi, at foreldur skuldu bæði havt møguleika at farið niður í arbeiðstíð, meðan børnini eru smá. Á tann hátt kundi bæði tikið lut í arbeiðs- og familjulívið, sigur Annika Wardum Joensen at enda.



# Kring heimin við Per Gúnt

**Gríma fer næsta leygardag undir endabrestin av teirra 25. leikári, og hetta verður gjørt við stórleikinum »Per Gúnt« eftir Henrik Ibsen. Axel Tórgarð hevur týtt leikin til føroyskt og Eyðun Johannessen hevur leikstjórnað teimum 10 leikarunum, sum skulu spæla sjónleikin**

SJÓNLEIKUR

*Ingrid Bjarnastein*



*Eisini í Dovrafjøllunum verður dansað og sungið. Hans Tórgarð spælir ungi Per Gúnt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Per Gúnt er vorðin til ein klassikara í Norðanlondum, og um Henrik Ibsen hevði livað, so hevði hann fylt 175 ár fimm dagar aftaná okkara frumframførslu.

Hetta sigur Eyðun Johannessen, sum leikstjórnar stórleikinum Per Gúnt, sum Gríma skal frumframføra leygardagin 15. mars.

– Hetta er størsta verkætlanin vit hava gjørt her í húsinum. Øll størri hava gingið fyri seg í Norðurlandahúsinum, og hetta er tískil tann størsta avbjóðingin vit hava til hesi hølini, greiðir leikstjórin frá.

Allir leikararnir uttan ein í Leikarafelag Føroya eru við í Per Gúnt. Tað vil siga, at heili 10 leikarar skulu á pallin næsta leygarkvøld.

## Søgugongdin

Per Gúnt er ein norskur knæbóndi. Hann livir eitt lív, har hann flýggjar frá tí eini støðuni í eina aðra. Vit ferðast úr Dovrafjøllunum strendurnar í Marokko og oyðimarkirnar í Egyptalandi og enda aftur í Noregi.

Um miðan aldur er Per vorðin til ein fjakkandi gorlakk, ið hevur tikist við alskyns ivasamt handilsvirksemi, so sum flutt trælir til Amerika, gudamyndir til Kina og gjørt prestar út við rom og bíblium.

– Leikurin er ein tragedia-komedia og alt har ímillum. Hann er eisini eitt stórt ævintýr, sigur Eyðun Johannesen.

Tveir leikarar spæla Per Gúnt. Hans Tórgarð og Páll Danielsen. Hans spælir Per Gúnt yngri og inn í umleið helvtina av lívsleið hansara og Páll Danielsen spælir Per Gúnt eldri.

Tíðin leikurin gongur fyri seg í er umleið fyrru helvt av 1800 talinum, men hann kundi saktans eisini gingið fyri seg í endanum av 19. øld og inn í 20. øld, har hann endar aftaná krígsárini.

Tað eru eini 40 leiklutir í Per Gúnt, so tað merkir, at leikararnir hava fleiri leiklutir. Nógvir dansur er eisini við í leikinum, tað verið seg alt frá eksotiskum dansi hjá arabaragentunum til trølladans hjá dovratrøllunum.

– Venjingarnar hava verð intensivar, og tað er ikki fyrr enn nú teir seinastu tíggju dagarnar, at leikararnir eru við at fáa eina heild burturúr.

Leikurin er tríggjar tímar, og veit Eyðun Johannessen at siga frá, at leikurin hevur einaferð verið spældur í fullum líki í Frankaríki, og tá tók hann sjey og ein hálvan tíma.

– Í Per Gúnt mást tú finna tín egna vinkul at spæla leikin út frá, og vit hava valt okkara.

Allir leikararnir hava verið við í leikgerðini og at byggja pall, so hetta er eitt stórt felagsverk. Gríma fegnast eisini um, at Axel Tórgarð enn einaferð hevur umsett teimum ein leik.

## Fakta

**Leikarar:**
Hans Tórgarð
Páll Danielsen
Ria Tórgarð
Katarina Nolsøe
Kristina Hansen
Birita Mohr
Laura Joensen
Høgni JOhansen
Bárður Persson
Kári Øster

Leikstjóri er Eyðun Johannessen



*Arabaragentur koma sum ein fatamorgana fram fyri Per Gúnt í oyðimørkini í Egyptalandi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Nær er altjóða kvinnudagur?

*Sosialurin hevur verið úti við penninum og linsuni og spurt nøkur fólk á gøtuni um tey vita, nær altjóða kvinnudagurin er*

VOX POP

*Ingrid Bjarnastein*



**Bjarni Nattestad, 19 ár**

Eg áni ikki nær hann er! Men tað merkir helst, at tú skalt ansa eyka væl eftir konufólkunum tá, og tey fara helst at plága teg um at keypa rósur. Hvør veit? Kanska eg fari at gera okkurt burturúr degnum í ár.



**Ingun Schiller, 32 ár**

Kvinnudagurin er 8. mars. Og ja, tað er gott at hava ein kvinnudag, sjálvt um tað ikki júst er tað eg gangi mest uppí. Tað eru jú rættindi, sum kvinnur hava bart fyri í fleiri ár, og ein dagur, sum kvinnur sjálvar hava tikið stig til at hava. Eg havi ongar ætlanir um at fara til nøkur tiltøk, sjálvt um eg okkurt árið havi verið til okkurt uppi í Norðurlandahúsinum.



**Elisabeth Grækarisdóttir Magnussen, 21 ár**

8. mars. Tað er ordiliga gott at hava ein kvinnudag, tí kvinnur hava jú verið kúgaðar í fleiri ár. Um eg fari at gera nakað veit eg ikki, men eg eri limur í Havnar Kvinnuarbeiðarafelag, og tað er eitt av mínum ískoytum til kvinnudagin.